gult cyan magenta svart



# Hans Fróði í summarhitanum

*Julian Johnsson venur ikki saman við hinum í Sogndal, og hann verður ikki tøkur aftur tær fyrstu vikurnar*

Lagið á landsliðsmiðverjanum í Sogndal er betri nú, enn tað var fyri nøkrum vikum síðani. Eins deyð er annars breyð, er eitt væl kent orðatak, og tað kunnu vit kanska brúka í hesum førinum.

Í føroyska liðnum í norskum fótbólti eru fleiri spælarar skaddir í løtuni. Tað hevur havt við sær, at tað nú er brúk fyri summum, sum ótolnir hava bíðað eftir møguleikanum.

Ein av hesum síðst nevndu hevur verið Hans Fróði Hansen. Eftir triðja óstbeinabrotið hevur tað verið torført hjá Hans Fróða at sleppa framat aftur. Einki hevur verið at sagt til, at lagið ikki hevur verið av tí besta, tí Hans Fróði fór í fjør av landinum fyri at royna, hvussu langt fótbóltsevnini kundu røkka og ikki fyri at sita á beinkinum.

Lagið á Juliani Johnsson er einki serligt nú. Hann er eisini í Noregi fyri at spæla fótbólt. Síðsta sunnudag varð hann skaddur, og skaðin í lærinum er so mikið álvarssamur, at miðvallarin verður ikki við aftur fyrrenn eftir stutta summarsteðgin.

At Julian varð skaddur bar møguleikan fyri Hans Fróða við sær. Hann kom inn í miðverjuna síðsta sunnukvøld. Ein annar miðverji varð fluttur fram á miðvøllin. Tað er manningartrot á miðvøllinum, og tað sær út til at gerast møguleikin hjá Hans Fróða:

– Sunnukvøldið kendi eg á mær, at tað gekk væl. Tað hevur gingið væl í venjingini síðstu tíðina, og eg rokni avgjørt við at fáa møguleikan at prógva, um eg hoyri til á besta liðnum, sigur ein væl nøgdur Hans Fróði Hansen úr Sogndal.

Fleiri føroysk feløg hava spurt seg fyri, hvussu møguleikarnir vóru at leiga føroyska verjuspælaran í Sogndal, men allar ætlanir hesum viðvíkjandi eru sleptar – fyribils í hvussu so er.

Í blaðnum týsdagin søgdu vit, at Sogndal skuldi spæla ein útsettan dyst síðsta mánakvøld. Upplýsingarnar høvdu vit úr norskum bløðum. Men dysturin varð ikki spældur. Hann er aftur úsettur og verður ikki spældur fyrrenn eftir stutta summarsteðgin.

Í gjárkvøldið skuldu Kurt Mørkøre, Hans Fróði Hansen og hinir í Sogndal spæla steypadyst. Á heimavøllinum høvdu teir vitjan av Vålerengen úr bestu deildini. Talan er um eit kent felag, har ein av teimum, sum vóru við norska landsliðnum í EM kappingini, spælir við. Tað er miðvallarin Kjetil Rekdal, sum sat á beinkinum í øllum trimum dystunum.

JH



*Hans Fróði Hansen er nú um at fáa fótin fastan á besta liðnum hjá Sogndal*

# Anand í serflokki

*Indarin Viswanathan Anand vann kvikkapingina Frankfurt Chess Classic Giants framanfyri Gary Kasparov*





*Hesu ferð eydnaðist tað Viswanathan Anand at vinna á Gary Kasparov. Anand sýndi í Frankfurt, at hann framvegis eigur at roknast millum sterkastu telvarar í heiminum*

**Mynd: CENS**

Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Teir seks fremstu telvarnir í heiminum eru ikki bangnir fyri at telva ímóti hvørjum øðrum. Hesaferð møttust teir í Frankfurt at telva eina spennandi kvikkaping sum hevði metstóra peningavirðisløn til vinnaran.

Eftir styrkisraðfylgju var manningin hendan; Kasparov, Kramnik, Anand, Shirov, Morozevich og Leko. Telva skuldu teir dupultumfar, sostatt tíggju umfør. 25 minuttir høvdu teir í part til talvið.

Skjótt sást at Anand varð ikki til steðga, og vann hann sannførandi kappingina við 7,5 stigum av teimum tíggju møguligum, meðan russiska kempan Kasparov bert fekk ognað sær seks stig, men nokk til eitt annað pláss.
Anand hevur higartil havt eitt sera ringt talvár 2000. Hevur als ikki líkt sær sjálvum, men telvingin hjá honum í Frankfurt varð av serkønum mett einastandandi. Hann tapti einki talv og telvaði sera positivt alla kappingina.

Kasparov er aldrin nøgdur við eitt annað pláss, men sjúka forðaði helst honum at spíla seg rættiliga út. Hann hevði krím undan kappingarbyrjan, men kendi seg frískan nokk at endaføra kappingina.

Kramnik bleiv tann triði í røðini við fimm stigum, meðan Shirov varð beint í hølunum við hálvum fimta stigi. Morozevich og Leko endaðu aftastir við hálvum fjórða stigi. Hesin seinni vann annars bæði ímóti Kasparov og Kramnik.

### Menniskjan hongur í

Tey síðstu árini hevur talvteldan ment seg við rúkandi ferð, og hendan ferð tykist ongan enda hava.

Tað eru tvær talvteldir sum veruliga hava sligið seg fastar í talvheimin; Deeper Blue og Fritz. Hendan síðsta er í roynd og veru eitt talvforrit ognað vanliga brúkaranum, til eitt nú at royna seg ímóti í privatum brúki. Tað varð nevnliga forritið Fritz, sum fekk møguleikan at royna seg fyri kortum ímóti elituni, undantikið Kasparov.

Kramnik, Anand, Shirov, Morozevich og Leko royndu seg tveir reisir móti telduni. Eins og í Frankfurt varð telvað kviktalv. Úrslitið varð 5-5!

Støðan var 4-4 áðrenn Shirov átti at telva tvey tey síðstu talvini ímóti forritinum. Sjálvt um Fritz kann rokna um 3. milliónir støður um sekundið, so væntaðu tey flestu kortini at Shirov ikki fór at skuffa menniskjatalvheimin. Fyrsta talvið vann Shirov við hvíta fólkinum, men í síðsta talvinum gjørdi Shirov eitt mistak við svarta fólkinum, sum Fritz revsaði við harðari hond. Gert tú eitt mistak ímóti Fritz, ja so tapir tú við brestin. Hetta seinna talvið er við í blaðnum í dag.

5-5 og enn vinnir teldan ikki ímóti menniskjanum, men sum teldan, eins og talvteldan útviklar seg í dag gongur neyvan long tíð fyrrenn heilin verður taparin í hesum heilaítrótti.

### FM í snartalvi

Verður í Kommunuskúlaskálanum leygardagin 1. juli kl. 11.00. Tilmelding á staðnum hálvan tíma undan kappingarbyrjan.

Miðað verður ímóti at hava ein opnan bólk við nógvum dupultumførum, men verður undirtøkan góð verður møguliga deilt í tveir bólkar.

Vinnarin fær 1500 krónur, steyp og heiðurin. Nummar tvey og trý fáa somuleiðis peningavirðislønir, og góðar ratingvirðislønir verða eisini givnar.

Luttakaragjaldið er 50 krónur.

Føroyameistarin Flóvin Tór Næs fær ikki møguleikan at ogna sær heitið FM í snartalvi. Hann fer nevnliga saman við Rógva W. Rasmussen og Martini Poulsen til Ungarns at telva kapping, ið byrjar 1. juli. Eftir hesa kapping fara Flóvin og Rógvi víðari til eina kapping í Kekkia.

## Talvið hesa vikuna

*Hvítur : Fritz (Talvforrit)*

*Svartur : Alexei Shirov*

1.e4 e6
2.d4 d5
3.exd5 exd5
4.Rif3 Rif6
5. Bd3 Bd6
6.0-0 0-0
7.Bg5 Bg4
8.Ribd2 Ribd7
9.c4 c6
10.c5 Bc7
11.Fc2 h6
12.Bh4 g5
13.Bg3 Rih5
14.Bxc7 Fxc7
15.Rfe1 Rfe8
16.Bh7+ Kg7
17.h3 Be6
18.Bd3 Rif4
19.Re3 f6
20.Rae1 Bf7
21.Bf5 Rif8
22.a3 Rxe3? Eitt avgerandi mistak sum bert gevur Fritz møguleikan at vinna
23.fxe3 Rih5
24.e4 Re8
25.e5 Rie6
26.b4 Rihf4
27.g3 Rig6
28.Rib3 fxe5
29.dxe5 Rief8
30.Fc3 Kg8
31.Fe3 Be6
32.Ribd4 Ff7
33.Fd3 Rie7
34.g4 Rieg6
35.Rixe6 Rxe6
36.Bxe6 Rixe6
37.Ff5 Rigf4
38.h4 d4
39.hxg5 hxg5
40.Kh2 Og Shirov gavst
1-0



# Sundalagsstevnan

*62 bátsmanningar havaa boðað frá luttøku á Sundalagsstevnuni, sum í ár verður í Kollafirði*

Jákup Mørk

Sundalagsstevna verður um vikuskiftið, og Róðrasambandið hevur nú boðað frá, hvørjir bátar hava meldað seg til róðurin.

Talið av bátsmanningum, 62, er tað størsta higartil í ár, og er ein orsøk til hetta helst, at nú er tað seinasta freist hjá teimum bátum, sum ætla sær at luttaka á ólavsøku.

Fyri at kunna luttaka á Ólavsøku, skal báturin nevnliga hava luttikið í minst trimum á undanfarnu FM róðrunum.

Nakrir bátar eru, sum bert hava luttikið í einum róðri higartil, og skulu teir hava møguleika at verða við á ólavskøku, er alneyðugt við luttøku á teimum báðum komandi stevnunum, sum eru sundalags- og vestanstevna.



*Fara tær á Jarnbardi aftur at skúgva alla mótstøðu til viks, tá tær skulu royna seg á sundalagsstevnuni, sum í ár verður í Kollafirði?*

**5-mannafør, dreingir**
1 Junkarin
2 Blikur
3 Spógvin
4 Kollur
5 Havfrúgvin
6 Tjaldrið
7 Drekin
8 Royndin Fríða
9 Sílið
10 Báran

**6-mannafør, kvinnur**
1 Sólmundur
2 Lómur
3 Hvessingur
4 Gongurálvur
5 Jarnbardur
6 Páll Fangi
7 Fuglfirðingur
8 Riddarin
9 Kollfirðingur

**5-mannafør, gentur**
1 Junkarin
2 Dúgvan
3 Spógvin
4 Blikur
5 Beinta
6 Havfrúgvin
7 Hvassi
8 Ørnin
9 Frúgvin
10 Drekin
11 Tjaldrið
12 Sílið
13 Royndin Fríða
14 Bylgjan
15 Firvaldur
16 Súlan
17 Kollur

**6-mannafør, menn**
1 Snopprikkur
2 Hósvíkingur
3 Hvessingur
4 Strálan
5 Kollfirðingur
6 Sólmundur
7 Gongurálvur

**8-mannafør**
1 Knørrur
2 Víkarbáturin
3 Kvívíkingur
4 Miðvingur
5 Gullbrandur
6 Toftabáturin
7 Argjabáturin
8 Nevið Reyða
9 Húsavíkingur
10 Heiðabáturin
11 Oyndri
12 Ørvur
13 Sjóriddarin

**10-mannafør**
1 Suðringur
2 Eysturoyingur
3 Havnarbáturin
4 Nólsoyingur
5 Vestmenningur
6 Kjølur

# Suni skal halda skil á

*Unglingafinalan verður á Mølini á Eiði í kvøld*

Nú er greitt, at tað verður Suni Johansen úr Sandavági, sum skal vera óhefti maðurin á vøllinum, tá GÍ og HB komandi sunnudag klokkan 15 fara at spæla finaluna í kappingini um løgmanssteypið á Tórsvølli.

Hjálpardómarar vera Jens Albert Simonsen og Hans Falkvard Hansen. 4. dómari verður Petur Reinert. Undan dystinum og í hálvleikinum fer Havnar Hornorkestur at spæla.

Í kvinnufinaluni, sum HB og KÍ fara at spæla á ovara vølli í Gundadali sunnudagin klokkan 12.30, verður Kim Ejdesgaard dómari. Hjálpardómarar verða Ólavur Weihe og Tommuy Jensen, og Regin Egholm verður 4. dómari.

Í unglingafinaluni, sum verður hóskvøldið klokkan 19.00 á Mølini á Eiði, verður Niklas á Líðarenda dómari. Hjálpardómarar verða Tummas Pauli Olsen og Jóannes Mikkelsen. Finalan verður millum HB og NSÍ.

JH



*Tað verður Suni Johansen úr Sandavági, sum skal døma finaluna um løgmanssteypið*

# Leiftur fær ikki spælt

*Altjóða uppgávurnar hjá Leiftri forða fyri, at teir fáa leikt sínar dystir í heimligu kappingini, og hetta hevur aftur við sær, at tað í løtuni ikki ber til at vinna seg av niðasta sessinum á stigatalvuni*

Intertoto kappingin ger, at tað er torført hjá føroyska liðnum at fáa pláss fyri dystunum í landskappingini Meðan Leiftur stríðist og hevur undanvind í Intertoto Cup verður spælt av lívsins kreftum í íslendsku landskappingini. Í Íslandi hava teir ikki summarfrí frá fótbóltinum soleiðis sum vit kenna tað her hjá okkum. Tað verður farið undir landskappingina nakað seinni, enn tað verður farið undir hana í Føroyum, teir enda fyrri, enn føroyingar gera, og tí verður spælt alla tíðina.

Tað eru veðurumstøðurnar, sum gera, at kappingin er løgd soleiðis til rættis. Men hetta ber trupulleikar við sær fyri tey feløgini, sum taka lut í europeisku kappingunum. Fyrsta liðið, sum í ár hevur kent sviðan av hesum, er Leiftur. Seinni í summar fara bæði ÍA og ÍBV at fáa somu trupulleikar.

Meðan hini liðini í Íslandi hava spælt átta dystir, so hevur Leiftur bara spælt seks, og føroyska liðið í Ólafsfirði fær ikki møguleikan at royna seg aftur í landskappingini fyrrenn 13. juli. Føroyingarnir í Íslandi fara ikki at keða seg næstu vikurnar. Tá teir fara at spæla fyrsta landskappingardystin verður talan um fjórða dystin í ellivu dagar. 13. juli verður mótstøðuliðið hjá Leiftri Fram úr Reykjavík.

Leiftur hevur higartil bara fingið seks stig, og teir eru nú aftast í bestu deildini. Mánakvøldið vóru fleiri dystir spældir. Liðið hjá Pálli Guðlaugssyni, Keflavík, hevði vitjan av liðnum hjá Una Arge, ÍA av Akranesi. Gestirnir vunnu 2–0. Teir komu á odda beinanvegin við brotssparki, og teir øktu til 2–0, tá ein góður hálvur tími var farin.

Oddaliðið í íslendsku kappingini er Fylkir. Mánakvøldið vunnu teir 2–0 í Grindavík. Stjørnan vann 2–1 á Breiðabliki. Hetta var fyrsti sigurin hjá Stjørnuni, sum harvið fór av aftasta plássinum.

I Íslandi verður nógv tosað um, at dystinir í landskappingini eru keðiligir á tann hátt, at so fá mál verða skorað. Fylkir hevur skorað fimtan mál í átta dystum. Einki av hinum liðunum hevur skorað fleiri enn ellivu mál.

Jens Martin Knudsen hevur áður víst á trupulleikan, at liðini í Íslandi leggja størsta dentin á at verja, og at tað meiri ræður um ikki at tapa heldur enn at vinna. Dreymurin hjá Jens Martini hevur verið at broyta spælið hjá Leiftri. Tað var m.a. tí, at teir á Ólafsfirði keyptu John Petersen. Higartil hevur úrtøkan hjá Leiftri í nýggju útgávun i ikki verið nakað serlig. Men tað kemst m.a. av, at teir hava spælt færri dystir enn hini liðini.

JH

**Støðan, íslendska landssímadeildin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fylkir | 8 | 4 | - | 4 | - | 0 | 15 | 6 | 9 | 16 |
| 2 | KR | 8 | 4 | - | 3 | - | 1 | 11 | 7 | 4 | 15 |
| 3 | ÍA | 8 | 4 | - | 2 | - | 2 | 7 | 5 | 2 | 14 |
| 4 | Grindavík | 8 | 3 | - | 4 | - | 1 | 10 | 5 | 5 | 13 |
| 5 | Keflavík | 8 | 3 | - | 3 | - | 2 | 8 | 12 | -4 | 12 |
| 6 | ÍBV | 8 | 2 | - | 5 | - | 1 | 11 | 6 | 5 | 11 |
| 7 | Fram | 7 | 1 | - | 3 | - | 3 | 6 | 10 | -4 | 6 |
| 8 | Breiðablik | 8 | 2 | - | 0 | - | 6 | 10 | 16 | -6 | 6 |
| 9 | Stjarnan | 7 | 1 | - | 1 | - | 5 | 3 | 8 | -5 | 4 |
| 10 | Leiftur | 6 | 0 | - | 3 | - | 3 | 3 | 9 | -6 | 3 |

gult cyan magenta svart